

BURÐARDYGT
VINNULÍV

**BURÐARDYGT**
VINNULÍV

# SAMAN RØKKA VIT **LONGRI**

# Um átakið

Burðardygt Vinnulív er ein felagsskapur við tólv føroyskum fyritøkum, sum hevur til endamáls at menna fyritøkum burðardyggar mannagongdir við serligum atliti at trimum ítøkiligum avbjóðingum: veðurlagsbroytingar, heilsustøðan í havinum og tap av lívfrøðiligum margfeldi.

Gjøgnum samstarv roynir felagsskapurin at gera sítt til at vera við í ST-málunum fyri burðardyggari menning (SDG 13 Veðurlagsátøk, SDG 14 Lív í havi og SDG 15 Lív á landi) skjótari og við størri ávirkan, enn vit høvdu megnað hvør í sínum lagi.

Í januar 2021 settu fyritøkurnar sær fyri at arbeiða saman í minsta lagi trý ár til tess at menna eitt strategiskt háttalag, ið eyðmerkir vágarnar og møguleikarnar, sum standast av hesum avbjóðingum.

Vit hava fimm høvuðsendamál: at gerast klókari og dugnaligari, at menna burðardyggar mannagongdir gjøgnum eina strategiska langtíðarætlan, at samstarva, at taka lut og ikki minst at hugkveikja onnur til eisini at raðfesta hesi stevnumið.

Henda rapport vísir á fyrstu fasu av okkara ætlan, har stjórarnir frá øllum tólv fyritøkunum koma við hvør sínum lyfti.

**Verður útgivið**

21. september 2021

www.burdardygtvinnuliv.fo

# Limirnir

Limirnir koma úr ymiskum fyritøkum, sum hava ymiskar bygnaðir og ymiskar marknaðir. Talan er um stórar fyritøkur.

Vav 1 og 2-útlátið hjá limunum var tilsamans 11% av samlaða føroyska CO2-útlátinum í 2020.. Okkara virksemi fevnir út um landoddarnar: Vit virka í fleiri enn tíggju londum, og okkara veitingarketa strekkir seg yvir fýra heimspartar.

Vit hava øll ein týdningarmiklan leiklut í vinnuliga kervinum í Føroyum, og mong okkara hava samstarvað á ymsan hátt í nógv ár.

Bakkafrost
Laksaaling

Betri
Banki

Effo
Orkuveitari

Faroe Ship
Vøruflutningur og logistikkur

Føroya Tele
Fjarskifti

Gist & Vist
Gestavinna og ferðavinna

JT Electric
Veitari av elektro-tekniskari havútgerð

KJ Hydraulik
Veitari av maskinum og tekniskari útgerð

MBM
Meginfelag búnaðarmanna

Poul Michelsen
Heilsøla

SMJ
Verkfrøðiráðgevar

Vónin
Fiskiskapur, fiskaaling og frálandsveiting

## Samstarvsfelagar

Januar
Løggilt grannskoðanarvirki

# Soleiðis fara vit at handfara **veðurlagsbroytingarnar**

## Okkara uppgáva

Hóast ymisk, so hava vit øll eina felags fatan av okkara ábyrgd í at gera okkurt við veðurlagsbroytingarnar.

Í mong ár hava vísindafólk rópað varskó og heitt á leiðarar um at gera nakað við støðuna. Nú er hetta vorðið eitt skundmál, og tí er tað alneyðugt við góðum samstarvi.

Alsamt fleiri meta, at fyritøkur eiga at taka støðu í málinum – bæði lítlar og stórar.

Okkara uppgáva er at brúka vísindalig tilmæli og altjóða rammuverk, ið eru væl grundað, at rætta okkum eftir, tá ið vit viðgera evnið.

### 50% lækking av $CO_2$e áðrenn 2030

Allar fyritøkur fara at minka teirra vav 1 og 2 $CO_2$ spor við í minsta lagi eini helvt áðrenn 2030.

### Net-zero áðrenn 2030

Tríggjar fyritøkur fara stigið víðari og ætla at røkka einum 0-vakstrarhúsgassútláti innan vav 1 og 2 $CO_2$ spor áðrenn 2030.

Næsta ár ætla vit at áseta mál innan vav 3 útlátsminking, og allar fyritøkurnar ætla at lata teirra mál inn til Science Based Targets Initiative fyri at tryggja, at vit fylgja vísindaligu tilmælunum til tess at minka um okkara ávirkan á veðurlagsbroytingarnar.

13 CLIMATE ACTION

Okkara arbeiði stuðlar SDG 13 Veðurlagsátøk. Vit fara at seta átøk í verk ímótiveðurlagsbroytingum – fyrst umvegis avmarking, síðani tillaging og harnæst í samstarvi við lokalum avgerðartakarum.

## Okkara tilgongd

Í felag menna vit eina strategiska og systematiska tilgongd til tess at handfaraveðurlagsbroytingarnar. Fyrst royna vit at skilja kontekstin, síðani eyðmerkja vit okkara ávirkan, og at enda raðfesta og planleggja vit loysnir, ið hava stóra ávirkan.

Vit fara til verka fet fyri fet. Men fetini eru stór. Í verkætlanargeiranum, sum viðger veðurlagsbroytingar, hevur okkara fyrsta uppgáva verið at skilt okkara egnu einstøku ávirkan. Fyrstu seks mánaðirnir kortløgdu vit okkara vav 1 (beinleiðis) og 2 (óbeinleiðis) $CO_2$-útlát og settu okkum sum mál (í tráð við vísindalig tilmæli) at minka vav 1 og 2 útlát við eini helvt áðrenn 2030. Í 2022 fara vit at halda áfram at skilja okkara vav 3 (óbeinleiðis) útlát, har vit samstarva við okkara virðisketu fyri at seta okkum fleiri mál at minka um útlátini. Vav 3 er, har fyritøkur hava størstu útlátini, og hesi eru verri at fáa tamarhald á. Men eisini her hava vit stórar ætlanir.

Næstu tvey árini fara vit eisini at hyggja nærri at tillaging og avmarking.

Vit gera frágreiðingar um framstigini hvørt ár, og vit miðja eftir at fáa trygging og váttan fyri, at tølini eru røtt, har tað letur seg gera.

## Okkara avbjóðingar

Vit vænta, at tá ið vit hava roknað út okkara óbeinleiðis GHG ($CO_2$-útlát) vav 3 útlát, fer okkara kolevnisslóð at vaksa munandi. Mong okkara hava stórar vakstrarætlanir, so um vit loysa útlátið frá vøkstrinum, so verður tað ein stór avbjóðing – serliga í økjum, har vit ikki hava so nógva ávirkan á okkara virðisketu. Men við tað, at mong okkara longu samstarva, so hava vit eyðmerkt nakrar hættir, sum gera, at hetta letur seg gera.

Fyri at røkka okkara mál um at minka vav 1 og 2 fara vit at líta á SEV um at halda sítt lyfti um at framleiða 100% varandi orku í 2030. At fáa ráð til reina orku, samstundis sum vit framleiða el og rannsaka aðrar orkukeldur, verður eisini ein avbjóðing. Hetta er ein avbjóðing, sum onnur oyggjalond umframt tey, sum ikki kunnu njóta ágóðan av liberaliseraðum orkumarknaðum, kenna seg aftur í.

Mong okkara hava eisini tørv á, at bæði viðskiftafólk og veitarar stuðla okkum og taka lut í hesi ferð, um hetta skal eydnast okkum.

Hvussu er og ikki, so vóna vit at vinna á øllum avbjóðingum í sátt og semju við øðrum íognarum.

# Soleiðis fara vit at verja og varðveita **høvini og lívfrøðiliga margfeldið**

## Okkara uppgáva

Oyggjalív er tengt at góðum tilknýti til náttúruna. Meðan náttúran kring Føroyar enn er rættiliga óspilt, so er støðan heilt øðrvísi úti í heimi. Nógv fáa sínar vørur og rávørur úr øðrum londum, og vit síggja tað sum okkara ábyrgd at vísa á, hvussu hetta ávirkar umhvørvið – bæði her heima og í globalum virðisketum.

Meðan altjóða fyritøkur støðugt raðfesta týdningin av at verja og varðveita høvini og lívfrøðiliga margfeldið, gera vit tað sama.

Eins og við veðurlagsbroytingunum hava vit sett okkum fyri at fylgja viðurkendum leiðreglum til at skilja, hvussu vit kunnu hava eina net-positiva ávirkan á lívfrøðiliga margfeldið. Vit hava fingið meira vitan á hesum øki, og tað halda vit áfram við í okkara arbeiði.

**100%** av fyritøkunum

átaka sær at gerast net-positiv í minsta lagi í einum øki av teirra ávirkan á lívfrøðiliga margfeldið áðrenn 2030 ella at stuðla øðrum fyritøkum í hesum.

14 LIFE BELOW WATER

15 LIFE ON LAND

Okkara arbeiði stuðlar SDG 14 Lív í havi og SDG 15 Lív á landi. Vit fara at royna nýggjar leiðir fyri at minka munandi um havdálking, vísa á burðardyggar mátar at gagnnýta vistskipanir á sjógvi og landi og minka um tap av lívfrøðiligum margfeldi og venda gongdini hesum viðvíkjandi.

## Okkara tilgongd

Her fara vit eisini skipað og systematiskt til verka. Vit hava verið á skeið fyri at læra meira um alheimshóttanir á lívfrøðiliga margfeldið og fingið til vega eina nágreiniliga analysu um rávørur og okkara ávirkan, sum hevur víðkað fatan okkara av okkara skyldu til at minka um náttúruoyðing og venda gongdini hesum viðvíkjandi.

Vit umboða ymiskar fyritøkur, og summi okkara hava størri tørv á náttúrutilfeingi enn onnur. Tó vita vit, at vit eru øll partur av somu skipan, eisini um okkara uppgáva er at fíggja ella bjóða loysnir til fyritøkur, sum hava heilt stóra ávirkan. Tí arbeiða vit saman og gagnnýta styrkirnar hjá hvørjum øðrum fyri at fáa hendan tydningarmikla boðskapin út.

Í verkætlanargeiranum, sum viðger lívfrøðiligt margfeldi og verju av havumhvørvinum, hava vit í innleiðandi partinum valt eitt ítøkiligt øki at byrja við. Vit fylgja eini mannagongd, har vit fáa serfrøðingar at hjálpa okkum, og vit seta okkum fyri, at áðrenn 2030 skulu vit røkka í minsta lagi einum máli at gerast net-positiv. Í 2022 fara vit at halda áfram at røkka hesum stevnumiði og seta onnur átøk í verk fyri at røkka tí og hugsa um, hvussu vit kunnu yvirføra hetta á onnur øki, sum vit kunnu gera nakað við.

Vit gera árligar frágreiðingar um gongdina.

## Okkara avbjóðingar

Summi okkara eru enn við at læra og skilja kreppuna viðvíkjandi lívfrøðiliga margfeldinum, og vit vita, at har er enn langt á mál, bæði hvat viðvíkur okkara vitan, men eisini tá tað snýr seg um at finna haldgóðar loysnir.

Rávørurnar og infrastrukturin í einum landi við góðum 54.000 fólkum kunnu ikki samanberast við grannalond okkara. Tað er avmarkað, hvørjar avgerðir vit kunnu taka – frá útvegan av rávøru til handfaring av burturkasti.

Vit vóna at kunna yvirvinna summar av hesum avbjóðingum gjøgnum okkara samband við áhugapartar umframt geva íblástur til onnur og aðrar partar í samfelagnum, so fólk fara at taka hetta málið upp sum skjótast.



“Vit eru fegin um at vera partur av einum bólki, sum ger framstig í hesum átrokandi máli, sum kemur okkum øllum við. Vit eru komin langt hesar fáu mánaðirnar, longri enn vit høvdu væntað, og vit síggja longu nú nógvar møguleikar fyri góðum samstarvi. Eg ivist ikki í, at hetta fer at seta ferð á gongdina í hesum málinum.”

**Regin Jacobsen**
Stjóri

### Útlát í 2020

Vav 1 & 2 CO2 spor:
96,301 TCO2e

### Mál fyri 2030

Vit fara at minka vav 1 og 2 CO2 spor við í minsta lagi50% áðrenn 2030 (við støði í 2018).

Fyri at røkka málinum fara vit næstu tvey árini at investera í ein nýggjan elriknan alibát og halda áfram at gera smoltstøðirnar el-riknar.

Vit lata okkara mál inn til Science Based Targets Initiative.

### Mál fyri 2030

Vit fara at royna at gerast net-positiv í okkara ávirkan á høvini í 2030 – líka frá okkara virksemi við alilaksi í firðunum til okkara virksemi á landi (skrivstovur, smoltstøður osfr).

Vit eru longu byrjað við tað, at vit eru farin at seta fíggjarligan stuðul av til gransking, so vit gerast klókari um lívfrøðiliga margfeldið á havbotninum í firðum og við sjóvarmálan. Vit framleiða og umgera framleiðsluburturkast av fiski og djórum til taðingarevni/lívfrøðilig tøð

í okkara biogassverki, umframt at vit endurskapa lendini og fuglaplássini nærhendis okkara smoltstøðir.



"Sum ein av stóru fíggjarligu stovnunum í landinum viðurkennir Betri Banki sína sosialu ábyrgd. Vit vilja binda okkum til at verða við til at menna eitt burðardygt samfelag, sum vit øll eru partur av, við at veita fígging og tænastur til okkara viðskiftafólk.

Vit vilja verja og varðveita umhvørvið, og vit fara at gera okkara part fyri at minka um CO2-útlátið við at gagnnýta varandi orkukeldur og gera viðskiftafólk okkara før fyri at gera tað sama.

Við at samstarva við Burðardygt Vinnulív hava vit lært meira um burðardygd og okkara ávirkan á umhvørvið. Hetta samstarv hevur fingið okkum at framskunda okkara tilgongd í at nærkast einum nullútláti."

**Jean Djurhuus**
Stjóri

### Útlát í 2020

Vav 1 og 2 útlát:
494 TCO2e

### Mál fyri 2030

Betri Banki fer at minka um vav 1 og 2 CO2e-útlát við 55% í 2030. Vit miða ímóti, at allir bilar okkara eru 100% elektriskir í 2030, og vit fara at skifta oljufýrini í okkara bygningum út við varandi orkukeldur.

Næsta ár fara vit at hyggja at okkara vav 3 útlátum í sambandi við fígging til okkara kundar, taka burðardygd við í okkara viðgerð av lániumsóknum og stuðla viðskiftafólkum okkara í at gerast meira burðardygg.

Vit lata okkara mál inn til Science Based Targets Initiative.

### Mál fyri 2030

Betri Banki miðar ímóti at gerast net-positivur í 2030, tá tað snýr seg um umhvørvisávirkan á sjógvi og á landi. Bæði hvat viðvíkur virksemi í Føroyum, okkara árin, hvar vit útvega rávørur, men eisini burturkastið, vit framleiða.

Vit ætla at fara upp í netverk, ið venda sær ítøkiliga til fíggjarstovnar sum t.d. Biodiversity Finance Pledge og harvið samstarva við aðrar fyritøkur, sum eisini stremba eftir at minka um tap av náttúruni og venda gongdini.



"Vit eru sera fegin um at vera við í hesari verkætlanini. Vit hava øll ábyrgdina av at taka okkum av umhvørvinum, sum vit eru partur av, og við hesi verkætlan viðvirkar økta fokusið á avbjóðingarnar, at mál og ætlanir verða framd fyri at koma á mál."

**Janus Thomsen**
Stjóri

### Útlát í 2020

Vav 1 og 2 útlát:
2,458 TCO2e

### Mál fyri 2030

Vit fara at minka um okkara vav 1 og 2 útlát við í minsta lagi 50% áðrenn 2030.

Vit fara at minka um okkara orkubrúk – bæði vakstrarhúsgassum og ravmagni– í okkara virksemisøkjum, so sum bygningum, goymslum, bensinstøðum og bilum. Vit fara eisini at kanna varandi orkukeldur og optimera nýtsluna av ravmagni.

Vit lata okkara mál inn til Science Based Targets Initiative.

### Mál fyri 2030

Við vindmyllulundum fara vit at royna at gerast meira net-positiv í 2030, tá tað snýr seg um umhvørvisávirkan á sjógvi og á landi.



FAROE SHIP

> "Í flutningsvinnuni er samstarv um burðardygd avgerandi, skulu vit røkka úrslitum, og vit hava átrokandi tørv á samstarvi. Vit mugu virka í felag; vit mugu vera á somu síðu, skulu vit røkka týðandi úrslitum.
>
> Vit mugu koma hagar, har vit í øllum okkara virki vænta – og krevja – somu atlit til burðardygd frá okkara samstarvsfelagum, sum vit áleggja okkum sjálvum.
>
> Eg haldi, at fyritøkur, ið einans leggja áherðslu á vinning, hava truplari dagar í væntu.
>
> Framtíðin setur krøv um heildaratlit, har hugsað verður um allar viðkomandi partar, ið fyritøkurnar ávirka í sínum virki. Einans fyritøkur, sum megna hesi heildaratlit, fara at standa seg í kappingini í framtíðini."

**Bogi P. Nielsen**
Stjóri

### Útlát í 2020

Vav 1 og 2 útlát[1]:
4,341 TCO2e

[1] Vit fylgja CO2e-leiðbeiningini, tá vit eyðkenna burðardyggu tiltøkini innan vav 1, 2 og 3 út frá mannagongdini um operationella stýring. Útlát frá skipum er tí ikki íroknað her.

### Mál fyri 2030

Vit fara at minka CO2 útlátið innan vav 1 og 2 í minsta lagi niður í 50% áðrenn 2030.

Leiðin, vit mugu ganga fyri at loysa flutningin frá fossilum brennievnum, hevur við sær eina stóra kollvelting fyri Faroe Ship. Fyrst og fremst leggja vit okkum eftir einari elektriskari umskapan av virkseminum. Umskapanin krevur eina røð av loysnum, har vit leggja mesta dentin á battaríorku, vetniskyknur og burðardygt lívrunnið brennievni.

Harumframt fara vit at kanna loysnir, sum fáa sum mest burtur úr orkuni vit nýta, og sum minka um nýtsluna av brennievni.

Vit lata mál okkara inn til Science Based Targets Initiative.

### Mál fyri 2030

Faroe Ship leggur seg eftir eini tilgongd, sum ger felagið net-positivt, tá tað snýr seg um ávirkan okkara á landi, á umhvørvið frá støðum og terminalum og ávirkanina av maskinum og útgerð, sum vit keypa til virksemi okkara á landi.

Skipaflutningur okkara hevur við sær, at vit hava eina týðandi ábyrgd, tá tað snýr seg um varðveitslu og vernd av lendi og lívfrøðiligum margfeldi. Vit eru bundin at eini munagóðari vandastýring í sambandi við virksemi okkara og bundin til at gera okkara part, so vit fáa eitt umhvørvi, sum er sterkt og mótstøðuført.

Vit skapa meirvirði fyri samfelagið, tá vit stuðla náttúruvernd og náttúruátøkum, sum gera størri mun enn ávirkan okkara á umhvørvið merkist.



> "Vit eru errin av at vera partur av hesum. Vit hava arbeitt við at gerast burðardyggari í nøkur ár, men hetta átakið hevur sett meira ferð á og veruliga eggjað okkum til at røkka einum nullútláti áðrenn 2030."

**Jan Ziskasen**
Samtaksstjóri

### Útlát í 2020

Vav 1 og 2 útlát:
2,996 TCO2e

### Mál fyri 2030

Vit binda okkum til eitt nullútlát í vav 1 og 2 $CO_2$ spor áðrenn 2030.

Vit fara at avkola okkara nýtslu av ravmagni samsvarandi ætlanina um avkoling hjá almennu orkuveitarunum. Vit fara frá bilum, ið brúka diesel og bensin til at brúka el-bilar. Vit fara framhaldandi at menna okkara núverandi fjarhitaskipan, og vit fara frá hitaskipanum, ið brúka gassolju, til at brúka jarðhitaskipanir og sjóhitaskipanir áðrenn 2030.

Vit lata okkara mál inn til Science Based Targets Initiative.

### Mál fyri 2030

Áðrenn 2030 ætla vit at gerast net-positiv í mun til ta ávirkan, vit hava á hav og land, tá ið vit leggja og útvega okkum kaðlar.

Vit fara at burturbeina infrakervið, ið er tikið úr nýtslu, herundir undirvatnskaðlar; og vit fara at hugsavna okkum meira um burðardygt tilfar, og hvaðani vit útvega okkum tilfarið. Vit fara eisini at taka atlit til og avmarka ávirkanina á umhvørvið, tá vit leggja nýggjar kaðlar.



g&v

"Burðardygd hevur verið á skrá hjá okkumí mong ár. Men síðani vit fóru við í Burðardygt Vinnulív, hava vit hugsavnað okkum uppaftur meira um, hvussu vit kunnu røkka einum nullútláti og fáa eitt betri samstarv við náttúruna. Sum liður í hesum fara vit at eftirkanna øll øki av okkara virksemi. Hetta ætla vit at gera í felag við øllum øðrum: øðrum fyritøkum í netverkinum, okkara starvsfólkum, viðskiftafólkum og veitarum."

**Johannes Jensen**
Stjóri

### Útlát í 2020

Vav 1 & 2 útlát:
1,330 TCO2e

### Mál fyri 2030

Vit binda okkum til eitt nullútlát í vav 1 og 2 CO2 spor áðrenn 2030.

Vit fara at brúka el-akfør og jarðhita á øllum støðum.

Vit lata okkara mál inn til Science Based Targets Initiative.

### Mál fyri 2030

Vit ætla at gerast net-positiv í okkara ávirkan á hav, land og vøtn áðrenn 2030, og KOKS verður fyrsta eindin at røkka hesum máli.

Vit byrja við at hyggja at okkara pakkitilfari og harnæst burðardygd í sambandi við kjøt, grønmeti og sjálvan bygningin. Vit fara at kanna burðardygdina í ymiskum rávørum so sum sjógæti umframt at seta okkum sum mál, at í minsta lagi 30% av grønmetinum er føroyskt; stigvíst steðga nýtslu av einnýtisplastikk; minka um nýtslu av kjøti; og at maturin ikki noyðist at ferðast alt ov langt.



JT electric

"At vera partur av Burðardygt Vinnulív hevur gjørt, at vit hava sett sjóneykuna á veðurlagsbroytingar, sum nú er vorðið eitt aðalmál – ikki einans fyri okkum, men eisini fyri okkara viðskiftisfólk. Umframt at seta okkum fyri at minka um okkara egna útlát og at stuðla viðskiftafólki okkara í at minka um teirra ávirkan á náttúruna, hugsavna vit okkum eisini um, hvussu okkara fyritøka kann stuðla øðrum í at skifta til ein búskap við eini lægri kolevnisslóð."

**Suni Justinussen**
Stjóri

### Útlát í 2020

Vav 1 & 2 útlát:
78 TCO2e

### Mál fyri 2030

Vit fara at minka vav 1 og 2 CO2-spor í minsta lagi niður í 50% áðrenn 2030.

Vit fara at byrja við at brúka jarðhita ella aðra líknandi loysn, har vit halda til, umframt at skifta bilarnar út við el-bilar, so hvørt nýggir bilar verða keyptir.

Vit lata okkara mál inn til Science Based Targets Initiative.

### Mál fyri 2030

JT electric miðjar eftir at gerast net-positiv í okkara ávirkan á lívfrøðiliga margfeldið á landi, og hetta fevnir eitt nú um, hvussu vit útvega rávørurnar. Vit ætla eisini at stuðla havbúnaðarvinnuni við at menna loysnir, sum hjálpa við at røkka eini net-positivari ávirkan á havsins margfeldið.

Eitt, sum vit fara at leggja dent á, er at savna og endurnýta el-káplar og útgerð.



“At gerast limur í hesum felagsskapi er okkara fyrsta fet á leiðini til at gerast burðardygg. At vera saman við fyritøkum við líknandi avbjóðingum ger tað lættari hjá okkum at gjøgnumføra eina kompetenta ætlan fyri hesi fyrstu fetini. Vit vóna og vænta, at hetta fer at hava eina tydningarmikla ávirkan á okkara arbeiði og teimum loysnum, vit bjóða okkara viðskiftafólki.”

**Ólavur Asafsson Olsen**
Stjóri

### Útlát í 2020

Vav 1 & 2 útlát:
562 TCO2e

### Mál fyri 2030

Vit fara at minka vav 1 og 2 CO2 spor í minsta lagi niður í 50% áðrenn 2030.

Fyrst fara vit at hyggja at alternativum hitaloysnum til okkara bygningar, og harnæst fara vit at vita, um vit kunnu skifta okkara bilar út við el-bilar.

Vit lata okkara mál inn til Science Based Targets Initiative.

### Mál fyri 2030

KJ Hydraulik fer at royna at gerast net-positiv í ávirkanini á hav og land, tá ið rávørur verða fingnar til vega og brúktar í havbúnaði.

Fyrsta økið, vit fara at hugsavna okkum um, verður framhaldandi at umvæla og endurnýta útgerð, veittar til alivinnuna. Vit fara eisini at royna at minka um oyðsl frá okkara aliringaframleiðslu.



> "Ferðin inn í framtíðina er grøn og burðardygg, og skulu vit yvirliva sum fyritøka, mugu vit við á hesa ferðina."

**Hákun Steingrímsson**
Stjóri

### Útlát í 2020

Vav 1 & 2 útlát:
1,179 TCO2e

### Mál fyri 2030

Vit fara at minka vav 1 og 2 CO2 spor við í minsta lagi 50% áðrenn 2030. Vit fara eisini at stuðla bóndunum í at minka um teirra ávirkan á veðurlagsbroytingar.

Vit fara at byrja við at skifta bilarnar út við el-bilar umframt at kanna aðrar loysnir til at hita okkara mjólkarúrdrátt og UHT-framleiðslu.

Vit lata okkara mál inn til Science Based Targets Initiative.

### Mál fyri 2030

Áðrenn 2030 ætla vit at verða net-positiv, tá tað snýr seg um ta ávirkan, sum okkara pakkitilfar hevur á umhvørvið í Føroyum. Vit fara eisini at stuðla bóndunum í at minka um teirra ávirkan á umhvørvið.

"P/F Poul Michelsen fegnast um átakið Burðardygt Vinnulív, sum hevur givið okkum ein møguleika at arbeiða miðvísari við burðardygd saman við øðrum føroyskum fyritøkum. Langt er á mál, so tað er av stórum týdningi, at vit koma væl í gongd við arbeiðið og ganga á odda, heldur enn at renna aftaná, tá krøvini koma. Vit hava øll eina ábyrgd, og saman hava vit møguleika fyri at gera ein veruligan mun innan fyri burðardygd í privatum vinnulívi í Føroyum.

P/F Poul Michelsen fer í fyrstu atløgu at arbeiða við at minka um CO2-útlátið hjá fyritøkuni og samstundis arbeiða saman við kundum og veitarum um at gera vøruúrvalið meira burðardygt. Fyritøkan fer eisini at arbeiða við at minka um burturkast við at skilja og endurnýta, har tað ber til."

**Poula Michelsen**
Forkvinna



### Útlát í 2020

Vav 1 & 2 útlát:
957 TCO2e

### Mál fyri 2030

Vit fara at minka vav 1 og 2 CO2 spor við í minsta lagi 50% áðrenn 2030.

Vit byrja við at minka um diesel og blýfría gassolju við at útskifta bilar, sum brúka hetta, við el-bilar umframt at kanna møguleikar fyri at minka um nýtslu av diesel í lastbilum. Harumframt fara vit at vita, um vit kunnu skifta oljufýrini út við hitapumpur og binda okkum til at gera nýggjar bygningar meira burðardyggar.

Vit lata okkara mál inn til Science Based Targets Initiative.

### Mál fyri 2030

P/F Poul Michelsen fer at royna at gerast net-positiv í ávirkanini, sum okkara pakkitilfar hevur á umhvørvið í Føroyum. Vit fara eisini at arbeiða tættari saman við veitarum og viðskiftafólkum og kanna, hvørja ávirkan vit hava á náttúruna.

Okkara høvuðsmál verður at skapa eina ábyrgdarkenslu í felagsskapinum við tí fyri eyga at fáa eina burðardygga strategi.



"SMJ heldur, at tað er umráðandi at verða ein partur av hesum átaki, har vit viðgera okkara felags avbjóðingar og arbeiða fram ímóti einum felags máli. Føroyska vinnan er noydd til at standa saman, um týðandi broytingar skulu gerast, og vit eru tí glað fyri samstarvið við hinar luttakararnar í hesum átakinum.

Vit í SMJ kenna okkara ábyrgd og hava tí bundið okkum til at røkka einum nullútláti áðrenn 2030. Harumframt fer SMJ at arbeiða fram ímóti, at vit í øllum verkætlanum stuðla okkara kundum og samstarvsfeløgum í at minka teirra ávirkan á umhvørvið.

Arbeiðið í átakinum Burðardygt Vinnulív hevur hjálpt okkum at seta framsøkin og ítøkilig mál fyri, hvussu vit skulu arbeiða fram eftir."

**Árni Jakobsen**
Stjóri

### Útlát í 2020

Vav 1 & 2 útlát:
120 TCO2e

### Mál fyri 2030

Vit binda okkum til eitt nullútlát í vav 1 og 2 CO2 spor áðrenn 2030.

SMJ fer at minka um orkubrúkið við at útskifta hitaskipanir í skrivstovubygningum við hitapumpur og útskifta allar bilarnar við el-bilar. Harafturat fer SMJ at stuðla viðskiftafólkum í at minka um CO2-útlátið, so tey samsvara við vísindalig tilmæli.

Vit lata okkara mál inn til Science Based Targets Initiative.

### Mál fyri 2030

SMJ fer at stuðla uppundir net-positivum loysnum í viðkomandi verk-ætlanaruppskotum og hava loysnir í huga, sum fevna um lívfrøðiliga marg-feldið og heilsustøðuna í havinum í øllum viðkomandi verkætlum áðrenn 2030.

Vit fara at stuðla okkara viðskiftafólkum í at røkka net-positivum loysnum, tá tað snýr seg um lívfrøðiligt margfeldi á landi, í vøtnum og í sjónum.



VÓNIN®

"Vónin hevur valt at luttaka í hesari verkætlan vegna týdningarmikla leiklutin, sum Vónin hevur sum veitari til fiski- og alivinnuna. Okkara virksemi er tengt at optimalum lívfrøðiligum margfeldi í havinum. Úr einum menniskjaligum sjónarmiði hava vit ikki ráð at gera annað, tá vit síggja alsamt fleiri broytingar og vandar í náttúruni. Vit eru noydd til at broyta kósina, soleiðis at næsta ættarlið hevur somu liviumstøður, sum vit hava í dag.

Vit ynskja at betra um okkara umhvørvisliga fótaspor, og vit meta, at um vit gera tað saman við øðrum aktørum úr vinnulívinum, hava vit størri ávirkan. Ikki einans á umhvørvið, men á alla tjóðina; um vit ganga á odda og skapa ein meira umhvørvisvinarligan hugburð."

**Hjalmar Petersen**
Stjóri

### Útlát í 2020

Vav 1 & 2 útlát:
880 TCO2e

### Mál fyri 2030

Vit fara at minka vav 1 og 2 CO2 spor við í minsta lagi 50% áðrenn 2030.

Vit byrja við at minka um okkara tørv á gassolju, sum í løtunimyndar bróðurpartin av okkara vav 1 og 2 útláti.

Vit lata okkara mál inn til Science Based Targets Initiative.

### Mál fyri 2030

Vónin fer at royna at gerast net-positiv áðrenn 2030 í okkara ávirkan á havumhvørvið í sambandi við burturbeining av fiskiútgerð.

Vit byrja við at samstarva við IRF, so vit kunnu tryggja eina burðardygga burturbeining av fiskiútgerð og harvið endurnýta sum mest.

Burðardygt Vinnulív er farið at samstarva við løggilda grannskoðanarvirkið Januar fyri at fáa eina avmarkaða grannskoðan av dátum um útlát. Tey eru serfrøðingar og fara at ráðgeva okkum í at rapportera gongdina.

## Rapporteringsgrundarlag fyri GHG-útlát

- Øll útlát og allir umrokningarfaktorar fyri beinleiðis útlát (vav 1) koma frá dátum hjá DEFRA (Ongland) frá 2020, meðan útlátsfaktorar fyri el-nýtslu eru grundaðir á nýggjastu tølini, ið vit hava fingið frá SEV.
- TC02e (Tonnes of Carbon Dioxide equivalent) verða útroknað og borin fram her. Hetta fevnir um vandar fyri globala upphiting, sum stendur frá vakstrarhúsgassi, sum hevur samband við brenning av lívrunnum brennievnum umframt koltvísúrni (CO2).
- El-nýtsla (vav 2) elvir til óbeinleiðis útlát umvegis brenning av lívrunnum brennievnum í orkustøðum til tess at framleiða orku. Beinleiðis útlát (vav 1) kemur frá brenning av lívrunnum brennievnum – føstum, flótandi og gassi – til upphiting, sum eitt nú skapar framdrátt í akførum og flutningstólum.
- Háttalagið, vit rokna kolevni við, er út frá The Greenhouse Gas Protocol, a Corporate Accounting and Reporting Standard (endurskoðað útgáva).
- Framferðarhátturin, ið varð valdur, var eftirlit við virkseminum. Øll tøl fyri útlát eru beinleiðis nýtsla fyri hvørja fyritøku faldað við einum orku-umrokningarfaktori (har tað er hóskandi) og kolevnisútlátfaktori fyri hvørja nýtslueind.
- Vit hava ikki tikið hædd fyri vantandi ella óliðug tøl frá virkseminum hjá fyritøkunum.
- Útlát frá fjarhita er mett við støði í einum carbon-faktori hjá verkætlanartoyminum, ið tvinnar saman relativa partin av útláti frá ráevnum millum spillolju, gassolju, orku frá burturkasti og biomassa við viðkomandi carbon-faktorar ásettir av bretsku stjórnini í “Greenhouse gas reporting: conversion factors 2020”. Hesir faktorar lýsa typiska innihaldið av carbon í hesum ráevnum.

# ÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA VIÐ AVMARKARI VISSU VIÐVÍKJANDI FRÁGREIÐING HJÁ BURÐARDYGGUM VINNULÍVI UM GHG ÚTLÁT

Tórshavn, tann 21. september 2021

## Til áhugabólkarnar hjá Burðardyggum vinnulívi

Vit hava gjørt eina váttan við avmarkaðari vissu um hjálagdu GHG frágreiðingina hjá Burðardyggum Vinnulívi fyri árið, sum endaði 31. desember 2020, ið fevnir um koltvíiltu- og líknandi útlát.

## Ábyrgdin hjá Burðardyggum Vinnulívi av GHG frágreiðingini

Burðardygt Vinnulív hevur ábyrgdina av at gera eina GHG-frágreiðing í samsvari við ásetingarnar í "Greenhouse Gas Protocol" sum frágreitt í "Rapporteringsgrundlag fyri GHG- útlát" í GHG-frágreiðingini. Ábyrgdin umfatar uppsetan, implementering og viðlíkahald av innnanhýsis eftirliti, sum verður mett skal til, soleiðis at GHG-frágreiðingin ikki hevur týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

GHG-kvantifisering viðførir týðandi íbornar óvissur grundað á, at ófullfíggjað vísindalig vitan verður nýtt til at fastseta útlátsfaktorar og virðini, ið eru neyðug til at samanbinda útlát av ymiskum gassum.

## Okkara óheftni og góðskueftirlit

Vit hava hildið ásetingarnar um óheftni og onnur etisk krøv í "Etisku reglunum fyri góðkendar grannskoðarar", ið fevnir um óheftni og onnur krøv, sum byggja á grundleggjandi meginreglurnar um falsloysi, partsloysi, yrkisførleika og neyðugt nærlagni, trúnað og yrkisatburð.

Grannskoðanarvirkið Januar er bundið at halda altjóða standardin um góðskustýring, ISQC 1, og brúkar soleiðis eina umfatandi góðskustýringsskipan, herundir skjalprógvaðar politikkir og mannagongdir viðvíkjandi tí at halda etisk krøv, yrkisstandardir og galdandi ásetingar í lóg og øðrum reglum.

## Okkara ábyrgd

Okkara ábyrgd er at gera eina niðurstøðu við avmarkaðari vissu um GHG-frágreiðingina grundað á arbeiðið, ið vit hava gjørt og tey prógvini, ið vit hava fingið. Okkara váttan við avmarkaðari vissu er gjørd í samsvari við altjóða standardin um váttanaruppgávur um Greenhouse Gas Statements ("ISAE 3410"), útgivin av International Auditing and Assurance Standards Board. Standardurin krevur, at vit leggja arbeiðið til rættis, soleiðis at vit fáa avmarkaða vissu fyri, at GHG-frágreiðingin ikki hevur týðandi skeivleikar.

Ein váttan gjørd við avmarkaðari vissu í samsvar við ISAE 3410 inniber, at vit meta um, hvørt standardurin er hóskandi til umstøðurnar hjá Burðardyggum Vinnulívi og nýtsluna av Greenhouse Gas Protocol sum grundarlag fyri frágreiðingini, meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í GHG-frágreiðingini, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, reagera uppá metta váðan um neyðugt í umstøðunum, og meta um samlaðu framløguna av GHG-frágreiðingini. Arbeiðið í sambandi við eina váttan við avmarkaðari vissu er munandi minni umfatandi, enn tá ein váttan verður gjørd við grundaðari vissu bæði viðvíkjandi mannagongdunum í sambandi við metingar av váðum, íroknað fatan av innanhýsis eftirlitinum, og mannagongdunum, sum eru gjørdar sum reaktión uppá mettu váðarnar.

Okkara arbeiði var bygt á okkara yrkisligu metingar, og fevndi um fyrispurningar, eygleiðingar av mannagongdum, gjøgnumgongd av skjølum, greinandi arbeiði og meting hvørt kvantifiseringsháttalagið og frágreiðingin samsvara við framda arbeiðið.

Samsvarandi umstøðunum av arbeiðinum, so hevur arbeiðið hjá okkum umfatað:

- Gjøgnum fyrispurningar fingið eitt forstáilsi av eftirlitsumhvørvinum og vitanarskipanunum hjá feløgunum í Burðardyggum Vinnulívi, ið eru viðkomandi til máting av útláti og frágreiðing, men vit hava ikki mett um sniðgeving av serstøkum mannagongdum, innheinta prógv fyri teirra implementering, ella kanna um hesi eru effektiv.
- Vit hava mett um, hvørt mannagongdirnar hjá Burðadyggum Vinnulívi fyri metingum eru hóskandi og eru brúktar konsekvent. Tó hava vit ikki kannað undirliggjandi data, ið metingarnar eru bygdar á, ella gjørt okkara egnu útrokningar til at meta um metingarnar hjá Burðardyggum Vinnulívi.

Vavið av arbeiðinum í sambandi við eina váttan við avmarkaðari vissu er munandi minni enn, tá ein váttan við grundaðari vissu verður givin. Tískil er vissan í okkara niðurstøðu munandi minni enn tann vissa, sum verður givin, um talan var um eina váttan við grundaðari vissu. Samsvarandi hesum, so lata vit ikki eina niðurstøðu við grundaðari vissum, hvørt frágreiðingin hjá Burðardyggum Vinnulívi um GHG-útlát í øllum týðandi lutum er gjørd í samsvari við "The Greenhouse Gas Protocol", sum frágreitt í "Rapporteringsgrundlag fyri GHG-útlát" í GHG frágreiðingini.

## Niðurstøða

Undir gjøgnumgongdini eru vit ikki komin fram á viðurskifti, ið geva okkum grund til at halda, at frágreiðingin frá Burðardyggum vinnulívi um GHG-útlátið fyri árið, sum endaði 31. desember 2020, ikki í øllum týðandi lutum er gjørd í samsvari við "The Greenhouse Gas Protocol", sum frágreitt í "Rapporteringsgrundlag fyri GHG-útlát" í GHG frágreiðingini.

**P/F Januar**
Løggilt grannskoðaravirkið



**Heini Thomsen**
Statsaut. revisor